## Danir dálka í Skotlandi

Orkufelagið DONG, sum danski staturin sigur, skal byggja eitt risastórt orkuverk í Skotlandi. Verkið skal brenna kol, og tað hevur vakt ans. Umhvørvisfelagsskapir halda tað vera pínligt, at eitt felag hjá danska statinum skal byggja eitt so dálkandi orkuverk, samstundis sum danska stjórnin verður vertur fyri altjóða veðurlagsráðstevnuni um eitt ár. Eitt nú spyr Greenpeace, hvussu Danmark skal mæla kinesarum frá at brúka kol til orku, tá tað almenna Danmark samstundis byggir kolorkuverk. Connie Hedegaard, ráðharri í veðurlagsmálum, sigur við Berlingaran, at alternativið er, at skotar byggja eitt verk, sum dálvar uppaftur verri enn tað hjá DONG.



## Jákup fyri tey hoyribrekaðu

Forkvinnan fyri Felagið Hoyribrekað seinastu fýra árini, Solveig Isfeldt, er farin úr nevndini, og í hennara stað er valdur Jákup Danielsen. Herfyri hevði Felagið fyri hoyribrekað í Føroyum aðalfund, har forkvinnan síðani 2004, Solveig Isfeldt, fór úr nevndini, meðan Jákup Danielsen, sum var í fyrstu nevndini hjá felagnum frá 1992, varð valdur aftur í nevndina. Eisini Marjun Hansen, sum var í fyrstu nevndini, kom aftur í nevndina hesaferð. Tann triði nevndarlimurin í Felagnum fyri hoyribrekað, Poul Øregaard, heldur fram í nevndini. Tað sama ger Leivur Guttesen, tiltakslimur. Nevndin hevur nú skipað seg við Jákupi Danielsen (myndin) sum formanni.



*Jóhan Dahl trýsti á knøttin, ið tendrar fyrsta sendaran til 3G netið. Hann legði dent á samskrifti sum vinnu í røðu sínari*

*Mynd: Bergur Johannesen*

# Nýggj telefon snildi

**Vodafone boðaði í morgun frá, at nú verður eitt nýtt net tikið í nýstu, sum millum annað ger tað møguligt at síggja persónin, sum man samskiftir við gjøgnum fartelefonina. Vodafone metir tað vera neyðugt við útbyggingini, millum annað tí nýggja netið orkar betri at bera nógvu samskiftisferðsluni**

SAMSKIFTI
*Bergur Johannesen*
*bergur@sosialurin.fo*

Í morgun kunngjørdi Vodafone, at fyrireikingarnar eru lidnar, og nú er gjørligt at nýta 3G tøkni á fartelefonum í Føroyum. Nýggja netið verður fyrst tendrað í Havn, og komandi vikurnar á Skálafjørðinum, Klaksvík og í Vágunum – í 2009 hava 80% av føroyingum atgongd til nýggja netið, sigur Bjarni A. Bjarnason, stjóri.

At nýggja netið var kostnaðarmikið at fara undir at seta upp í Føroyum, leggur hann ikki lok á, men tað er sera neyðugt.

- 3G-netið hevur átta ferðir størri talirúm enn verandi net. Serliga í Havnini er ofta nógv trýst á netinum, og tí mugu vit útbyggja netið.



*Bjarni A. Bjarnason, stjóri í Vodafone, ringdi fyrstu video samrøðuna, sum Jóhan Dahl, landsstýrismaður í vinnumálum tók ímóti*

*Mynd: Bergur Johannesen*

Umframt at arbeiða skjótari og hava betri pláss fyri samskiftinum, verður gjørligt hjá viðskiftafólki at nýta internet á fartelefonini við ferð upp í 7,2 mbps, at samanlíkna er skjótasta breiðbandið til privata nýtslu 8 mbps í Føroyum. Hendan ferðin er upp til 40 ferð skjótari enn internetið hagartil hevur verið á fartelefonini.

Fyrsta støðin, sum er ein partur av 3G netinum, varð í morgun tendrað av Jóhan Dahl, landstýrismanni í vinnumálum. Eftir hann hevði trýst á knøttin, ringdi Bjarni A. Bjarnason til landstýrismannin, fyri at royna skipanina. Eftir eina miseydnaða roynd, riggaði at síggja hvønnannan gjøgnum fartelefonina.

### Møguleikar fyri onnur

Sokallaða 3G tøknin loyvir umframt skjótum interneti og video-samrøðu, eisini sjónvarpi á fartelefonini. Hetta er nógv nýtt uttanlanda, men er enn ikki gjørligt í Føroyum. Allan Dalsgarð, leiðari á Miðladeildini hjá Kringvarpinum, sigur, at tað er ein spennandi møguleiki, men enn er ikki vist hvat verður gjørt við hann.

- Í verandi løtu loyvir tøknin hjá Kringvarpinum ikki hesum, men tað er ein náttúrligur partur av okkara menning at gera vart við okkum á alnótini, sigur Allan Dalsgarð.

Vodafone býður eisini øðrum veitrum verða vælkomnir at biðja um loyvi at nýta teirra net.

Ikki allar fartelefonir hava møguleika at nýta 3G, men mett verður at umleið ein triðingur av fartelefonunum í Føroyum kunnu fáa gagn av hesum.

### Stórt stig

Innan fartelefoni er hendan nýggja tøknin eitt stórt stig. Fyrst kom gamla NMT skipanin, og tað var kollveltandi tá GSM fyri nøkrum árum síðan varð tikið í nýtslu. Vodafone metir, at tað er eins kollveltandi at føroyingar nú hava møguleika at nýta 3G.

- Í stuttum ber til at siga, at fartelefonin og internetið smelta saman í eina sera skjóta og mobila eind. Nú fáa vit brúkt fartelefonina til alt tað, sum internetið bjóðar, sigur Bjarni A. Bjarnason.

# Íslendskur fólkasangari til Føroya

**Um tveir mánaðir kemur kendi, íslendski troubadururin, Bubbi Morthens, til Føroya at hava konsert í Norðurlandahúsinum**

KONSERT
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*



*Eins og Kári P í Føroyum er Bubbi Morthens í Íslandi kendur fyri sínar samfelagskritisku sangir*

*Mynd: eimreidin.is – google*

Íslendska svarið upp á okkara egna Kára P, Bubbi Morthens, kemur nú til Føroya at halda konsert. Talan er um kenda troubadurin, Bubbi Morthensen, sum í mong verið sera vælumtóktur í Íslandi. Eisini hevur hansara tónleikur verið nógv spældur í Føroyum.

Mest kenda lagið í Føroyum er ivaleyst »Tað er gott at elska«. Eisini hevur Kári P føroyska onkran av sangunum hjá Bubba Morthens. Til dømis lagið »Tala við gluggan«, sum kom út á fløguni Hinumegin Ringvegin í 1992.

Síðan Bubbi gav út plátuna Ísbjarnablues í 1980, hevur hann givið út eitt ótal av fløgum og plátum. Minst ein ella tvær plátur ella fløgur eru givnar út á hvørjum ári síðani. Bæði sum solistur ella saman við bólkum.

Millum bólkarnar, sum Bubbi Morthens hevur verið partur av, eru Bubbi & Rúnar, Bubbi & MX-21,Das Kapital, Ego og Utangarðsmenn. Seinasta útgávan hjá Bubba er ein DVD, sum hann hevur spælt inn saman við Reykjavíkar Stórbandi.

Konsertin í Norðurlandahúsinum verður leygarkvøldið 31. Januar klokkan 19.30. Atgongumerki fáast á vanligu støðunum, upplýsir Norðurlandahúsið.